# Løgmaður heldur við Obama...

**-Tá Jørgen Niclassen úttalar seg um amerikanska valið og vónar, at McCain fer at vinna, so er tað ikki sum føroyskur uttanríkisráðharri men sum privatmaður. Landsstýrið skal ikki hava nakra støðu til, hvør skal verða amerikanskur forseti sigur Kaj Leo Johannessen, sum tó ikki dylur fyri, at hann sjálvur heldur við Obama.**

USA VAL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Eg haldi ikki, at almennu Føroyar skulu hava nakra meining um, hvørt Obama ella McCain skal vera komandi forseti í USA. Hetta sigur Kaj Leo Johannessen, løgmaður, nú Jørgen Niclassen, uttanríkisráðharri í samrøðu við Dimmalætting leygardagin sigur seg vóna, at McCain vinnur valið.

-Tá Jørgen Niclassen úttalar seg soleiðis, so má tað standa fyri hansara persónligu rokning, tað er í hvussu so er ikki umboðandi fyri almenna føroyska uttanríkispolitikkin sigur løgmaður. Landsstýrið hevur als ikki umrøtt hetta málið og hevur tí heldur ikki nakra felags støðu um tað. Spurdur um hvat hann sjálvur heldur um tey bæði valevnini sigur Kaj Leo Johannessen:

-Persónliga dámar mær nógv betur Obama, tó at eg ikki hava nakra sterka meining um hetta. Men út frá tí eg havi lisið og hoyrt higartil um amerikanska valið, so haldi eg, at Obama er ein nógv meira spennandi persónligheit, ein maður, sum kann vera við til at fremja broytingar. Hann virkar til at vera ein sera sympatiskur persónur. Skuldi eg atkvøtt í USA, so er eingin ivi um, at eg hevði atkvøtt fyri Obama.

Løgmaður heldur, at tað er tørvur á veruligum broytingum í USA, soleiðis at landið kann vera ein allieraður hjá øllum heiminum. Tí vónar hann, at Obama kemur framat valdinum, hóast hann heldur, at tað er ringt at gjøgnumskoða hjá føroyingum, hvat fer at henda, um antin Obama ella McCain kemur til, tí amerikanska samfelagið er so komplext.

–Men eg haldi, at Obama virkar sera savnandi, og tað er av stórum týdningi. Haldi eisini at tann største avbjóðingin í sambandi við valið er av búskaparligum slag, og har haldi eg, at Obama er tann betri maðurin.

Formaðurin í største andstøðuflokkinum á løgtingi, Høgni Hoydal sigur í eini viðmerking til úttalilsini hjá Jørgen Niclassen, at við at taka undir við krígnum í Irak ger uttanríkisráðharrin gongur hann beint ímóti einum meiriluta í løgtinginum, sum hevur mótmælt Irakpolitikkinum hjá eitt nú donsku stjórnini. Høgni Hoydal sigur, at Jørgen Niclassen er við at privatisera føroyska uttanríkispolitikkin.



*Bæði núverandi og fyrrverandi løgmaður stuðla Obama*



*Kaj Leo Johannessen, løgmaður vónar, at Obama vinnur amerikanska valið*

# ...tað sama ger fyrrverandi løgmaður



*Jóannes Eidesgaard er samdur við Høgna Hoydal, sum finst at Jørgen Niclassen fyri alment at taka undir við krígnum í Irak*

**Formaðurin í Javnaðarflokkinum og fyrrverandi løgmaður, Jóannes Eidesgaard er samdur við Høgna Hoydal, formann í Tjóðveldi, tá hesin finst harðliga at Jørgen Niclasssen, uttanríkisráðharra, sum í samrøðu við Dimmalætting tekur undir við krígnum í Irak, sum Føroya løgting hevur vent sær ímóti. Eins og núverandi løgmaður so stuðlar tann fyrrverandi eisini tí demokratiska valevninum Obama.**

USA VAL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Javnaðarflokkurin í Føroyum hevur altíð sympatiserað við demokratiska flokkin í USA og sjálvandi altíð ynskt, at tað stórveldi sum USA er verður stýrt av einum demokrati, og tí vóni eg sera sterkt, at Obama fer at vinna valið, tí sum hann sjálvur sigur i sinum slogan: -vit hava brúk fyri eini broyting. Tað er júst broytingin, sum hann kann standa inni fyri, eitt nú úti í heimi, har tann agressivi uttanríkispolitikkurin, sum Bush umsitingin so skeivt hevur ført, nú verður tónaður niður og man fær minkað um spenningarnar sigur Jóannes Eidesgaard við Portalin. Og hann heldur fram:

-Sjálvandi veit eg, at Obama, hvussu góður forseti hann enn verður, neyvan fær avtrappað allar spenningar, men eg trúgvi, at hann nógv betri enn McCain megnar at fáa meira trygg viðurskifti. Innanríkispolitiskt ivist eg ikki í, at tann vanligi amerikanarin er betri farin av, at ein demokratur situr i Hvítu Húsunum enn ein republikanari, tí júst tað at Obama er tann, sum hann er, signalerar nakað heilt nýtt sigur Jóannes Eidesgaard, sum vísir á tíðina heilt afturi í 60-unum, tá tann fyrsti litti studenturin kom inn á eitt universitet, og tað var øgilig gøla um tað.

Fyrrverandi løgmaður vísir á, at USA hevur havt tveir littar uttanríkisráðharrar, og nú bendir alt á, at landið fær ein littan forseta. Obama signalerar tí eisini eina broyting viðvíkjandi toleransu millum fólkasløg, so hann er m.a. tí so avgjørt mítt val sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini hevur nøkur orð á vegnum til Jørgen Niclassen, sum í samrøðu við Dimmalætting sigur seg taka undir við Irakkrígnum.

-Eg eri samdur við Høgna Hoydal, sum finst at Jørgen Niclassen fyri hanasra úttalilsi í um Irak, tí vit hava jú eina samtykt í tinginum, sum sigur, at vit taka frástøðu frá krígnum i Irak. Men tað kemur ikki óvart á meg, tí Fólkaflokkurin hevur altíð havt eitt veikt hjartað fyri republikanarum sigur formaður Javnaðarfloksins og sitandi fíggjarmálaráðharri, sum ikki heldur tað vera serliga smart av okkara uttanríkisráðharra sum alment umboð at úttala seg um, at tað er gott við krígnum í Irak, tá løgtingið jú hevur sagt tað øvugta.

-Eg veit væl, at hetta er valið hjá amerikanarum, men hyggur tú at heimskortinum, so síggja vit, at heimurin allur hevur betri av, at Obama vinnur valið, eisini tá tað snýr seg umhvørvi, avdubbing og meiri frið, sjálvt um eg veit, at hann klárar ikki at loysa allar trupulleikar. Men Obama stígur tey røttu fetini.